VALGREINAR

# Samferðsla og økismenning

**Thomas J. Askham**
*valevni Miðfloksins í Suðurstreymoy*



Fyri at kunna fáa eina optimala økismenning eru fyritreytirnar at tað er ein munagóð samferðsla. Við teimum samferðslu útbyggingarætlanum, sum eru uppi í tíðini, síggjar vónirnar rímiliga bjartar úr fyri økismenning og fyri tey, sum ynskja framhaldandi at búleikast í sínum egna nærumhvørvi.

Um vit hyggja eftir teimum ítøkiligu ætlanum, sum eru settar í verk, so koma ikki at ganga mong ár til Norðoyggjar verða bundnar við meginøkið við undirsjóvartunnil. Hetta vil óivað menna vinnulívið í Norðoyggjum munandi.

**Sandoyggin og Suðuroyggin**
Tað næsta stiðið, ið gjørt eigur at vera, er at ein undirsjóvartunnil verður gjørd til Sandoynna.

Við at fáa Sandoynna eina undirsjógartunnel, verður farleiðin hjá Suðuroyingum munandi styttri.

Ein máti at fingi betur og títtari samband við Suðuroynna, var at skjóttgangdi Smyril sigldi fleiri túrar av Tvøroyri til Sandoynna.

Fyri at fíggja ein part av hesi rutu var ikki órímuligt at eitt ávíst prosenttal krónur blivu fíggjaðar av teimum ymsu undirsjóvartunlunum norðanfjørðs. Mær tykir at hettar var ein gongd leið til annað og betur var funni.

Suðuroynni tørvar at tað verður gjørt nakað munagott á samferðsluøkinum, so at økismenningin kann blíva størri og betri enn sum nú er.

Her eiga allar góðar politiskar kreftir at lyfta í felag, so at tað sum verður tilvirka verður at koma víðari til keypara ella markna, sum skjótast.

**Suðurstreym / Nólsoy**
Í Nólsoy hava og eru virkisfús fólk, sum vilja seta á stovn eitthvørt sum kann verða bygdini til frama. Tann trupuleiki, sum ein hevur havt at dragast við nú í skjótt mong ár, eru teir sera avmarkaðu samferðslumøguleikarnar sjóvegis.

Tíðin fyri núverðandi Rituna, er fyri mongum árum síðani farin.

Tað eigur at verða ítøkiliga so skipa fyri, at eitt annað størri og høskiligari skip verður fingið til vega. Tað skal verða eitt skip við rampu, sum kann førða tilvirkaðan fisk og annan tungan flutning. Skal økismenning vinna frama í oynni, so verður tað neyðugt við øðrum flutningsmøguleikum.

Við at føra ein varligan skinsaman fíggjarpolitik er eingin orsøk til at fara út at byggja nýggja Ritu.

Tað átti tí so skjótt sum tilberð, verið farið undir at kanna hvar ein møgulig fergulega kundi verið úti í Nólsoy, so henda møguliga kundi byrjast uppá so skjótt sum tilbar.

Tá Norðoyggja undirsjóvartunellin er liðug verður so skip tøkt til siglingina um Nólsoyarfjørð.

Við einari betri farleið til Nólsoy kunnu tey í bygdini byrja at leggja til rættis vinnulív. Eldrasambýli kann verða sett á stovn, óivað eru mangir aðrir møguleikar. Oyggin er vøkur, so tað skuldi ikki undra meg um ikki ferðavinna kundi verið ein møguleiki.

Miðflokkurin vil málrætta arbeiða fyri eini økismenning í landi okkara.

Miðflokkurin vil líða á hvat vinnulívið hevur at føra framm, sum kann tæna og verða til frama fyri landi og fólki okkara.

Góðu veljarar. Vit heita staðiliga á tykkum um ikki at sita heima valdagin, men at tit standa saman við okkum og seta ein sterkan Miðflokk inn á ting. Vel lista H. ella eitt av valevnum flokksins.

# Øll tosa um búskapin!

**Bjarki Mohr**
*valevni hjá Javnaðarflokkinum í Suðurstreymi*



Men flestu skilja tíverri ikki ímillum samfelagsbúskap og virkisbúskap.

Undir valstríðnum higartil, hava allir flokkar - og nógv valevnir - tosa um búskapin í Føroyum. Um hesin er illa umsitin, sera væl umsitin ella bara nøktandi. Nógvar - og tilsvarandi ymiskar - meiningar eru um málið, men tað má tíverri staðfestast, at flestu flokkar og valevnir ið hava greitt frá, skilja als ikki millum samfelagsbúskap og virkisbúskap.

Búskaparliga læran greinar vanliga hugtøkini í tvinnar høvuðsbólkar, samfelagsbúskap og virkisbúskap.

Í samfelagsbúskapinum arbeiðir man við teim viðurskiftum, ið eru galdandi fyri sjálvt samfelagið sum heild, umframt tey yvirskipaðu fíggjarligu sambondini, ið eru millum lond.

Í samfelagsbúskapinum arbeiðir man tí við hugtøkum sum arbeiðsmegi og arbeiðsloyi, við rentu- og inflatiónstrupuleikum, við gjaldsjavnanum og tjóðarroknskapinum. Eisini arbeiðir man við uppsparingini í samfelagnum, v.m..

Í virkisbúskapinum arbeiðir man við teim einkultu fíggjarligu eindunum í samfelagnum, t.v.s. tað einkulta virki, um hvørjar møguleikar ella trupuleikar sjálvt virki - ella virkisøki - hevur.

Herumframt tosar man eisini um tað einkultu nýtslueindina, ið vit vanliga kalla privata húsarhaldið.

Vert er at leggja merki til, at í dag inniheldur fakumráðið rakstrarbúskapur bæði hugtakið vinnubúskap og virkisbúskap. Virkisbúskapur er eitt hugtak, ið fevnir um høvuðsvinnur, t.d. fiskivinnuna, alivinnuna, fíggjarvinnuna, landbúnaðin ella aðra handilsvinnunu. Hugtakið tekur tí støðið í bæði fíggjarligu gongdini yvir tíð innan ymisku høvuðsvinnurnar, samstundis sum man viðger teir trupuleikar ið eru tengdir at rakstrinum hjá einum virki, ið liggur innan ein av áðurnevndu høvuðsvinnum.

Orðatakið sigur "eitt er bók at lesa, annað er skip at føra". Orðaspælið gevur okkum veruliga nakað at hugsa um, tá vit hoyra politisku markeringarnar.

Tað er umráðandi fyri eitt samfelag, at landsins leiðsla megnar at skilja ímillum hugtøkini í praksis, nær tosa vit um samfelagsbúskap, og nær tosa vit um virkisbúskap. Gerða vit ikki tað, er vandi fyri at politiskar semjur bert koma at vísa atlit yvirfyri einstaklingum, heldur enn samlaðu vinnuni, og ikki minst samfelagsheildini.

# Palliba og Marsanna – nú ætla teir at einskilja tykkum

**Egin Henriksen**
*valevni Miðfloksins í Suðurstreymoy*



Valla fáa tit frið, so leingi so frætt av blóði er í tykkum, at tað loysir seg at tappa.

Eins og dýraverðin hevur sínar sjakalar, hevur eisini fíggjarverðin sínar, og liggja teir støðugt á lúri eftir fongi.

Tað er neyvan tykkara vælferð, ið liggur teimum á hjarta, sum nú rópa upp um einskiljingar.

Tit eru mest áhugaverd, tá gildið skal gjaldast.

Nakað av tí, ið eg rokni við fer at henda, um einskilt verður, er, at Maersk keypir Atlantsflog, og harvið verður einaráðandi aftur á Føroya rutuni, og tit, Palliba og Marsanna, sleppa bert á flog, tá tað liggur fyri hjá teimum - eins og tað var fyrr. Burtur verða tey góðu tilboðini, prísirnir hækka og tænastustøðið lækkar.

Danske Bank keypir Føroya Banka - byrjar ein garvillan útláns politikk (vi er professionelle) - samfelagið er ein spegilsmynd av bankunum, og samfelagið fer út at koyra enn einaferð.

Salomon kongur segði í sínum vísdómi at, "onki er nýtt undir sólini", og hevur hann so púra rætt.

Palliba og Marsanna, eg veit ikki hvussu tit føla tykkum, men eg má siga fyri meg, at eg havi lítið álit á øllum hesum smartu loysnunum og á ráðgevunum, sum látast meir ella minni alvitandi.

Vit hava sæð tær smartu loysnirnar í verki, og tað er synd at siga, at tær gagnaðu okkum.

Vit hava bløtt í ólukkumát, og tá upptakið skal gerast, eru teir við teimum smartu loysnunum, sum soknir undir heilt - tá er einki tos um einskiljing, nei, tá eiga Palliba og Marsanna trupulleikarnar.

Vit í Miðflokkinum verja tykkara áhugamál, og tað skulu sera góð argument á borðið, áðrenn vit ganga við til nakra einskiljing.

So, um tit eru samd við mær, fari eg at biða tykkum um at atkvøða fyri Miðflokkinum, tí uttan fólksins stuðul fáa vit einki gjørt.

Tit hava brúk fyri tænarum - harrum hava tit havt nokk av.

Minnist til, at ein góður leiðari er ikki omanfyri tykkum, men gongur framman fyri og slóðar vegin.

Uttan visiónir doyr fólkið.

Tit fáa eitt betri samfelag við Miðflokkinum til róðurs.

Gud signi Føroyar mítt land

X við lista H

# Mentanin strikast!

**Elin Tausen**
*Valevni Miðfloksins í Suðurstreymi*



Hetta hevur verið at hoyrt nógv síðani valskráin hjá Miðflokkinum bleiv løgd fram.

Sjálvandi kann mentanin ikki strikast. Tann føroyska mentanin býr í hjartanum á hvørjum einstøkum føroyingi, bæði sambandsmonnum og loysingarmonnum.

Tað, sum vit í Miðflokkinum siga er, at tað er ein spurningur um raðfesting. Skulu vit brúka fleiri 10 tals mill uppá at stuðla mentanini, soleiðis at nøkur fá kunnu arbeiða við list, skriving o.ø., meðan fólk, sum hava tørv á heimahjáp fáa hana ikki. Tørvurin á ellisheimum er risa stórur, sinnisveik og menningartarnaði mangla búðstaðir o.s.fr. Eg kundi hildið áfram, tí tann menniskaligi tørvurin er yvirhondsstórur. At fáa henda tørvin nøktaðan kemur fremst í okkara raðfesting av skattaborgarans peningi.

Tað er ikki tí at vit ikki ynskja at hava eitt ríkt mentunarlív í Føroyum, men ein er noyddur at raðfesta peningin, og ynskja vit at raðfesta tann tørvandi føroyingin fremst. Vit eru blivin spurd hvar vit ætla at taka peningin frá fyri at fíggja okkara valskrá, og tað hava vit ikki hildið loyniligt.

Miðflokkurin er tann flokkur, sum hugsar um tey, sum ikki rópa harðast, men hava størsta tørvin.

Vís okkum álit, og gev okkum tína atkvøðu 20. januar.

Setið X við lista H.



## Suðurstreymoyar valdømi

| Suðurstreymoyar valdømi | 2004 | 2002 |
|---|---|---|
| **A. Fólkaflokkurin** | ______ | **2288** |
| Listin | ______ | 313 |
| Óli Breckmann | ______ | 511 |
| Bjarni Djurholm | ______ | 392 |
| Poul Michelsen | ______ | 293 |
| Annika Olsen | ______ | 134 |
| Heðin D. Poulsen | ______ | 78 |
| Eli Christiansen | ______ | 57 |
| Elna Skylv Hansen | ______ | |
| Jan Hansen | ______ | |
| Poul Michelsen | ______ | |
| Torkil V. Rasmussen | ______ | |
| Turið Christophersen | ______ | |
| **B. Sambandsflokkurin** | ______ | **2989** |
| Listin | ______ | 398 |
| Lisbeth Lindenskov Petersen | ______ | 1394 |
| Heðin Mortensen | ______ | 410 |
| Kaj Leo Johannesen | ______ | 263 |
| Høgni Mikkelsen | ______ | 201 |
| Annfinn Brekkstein | ______ | 91 |
| Súsanna Dam | ______ | 69 |
| Jóhan Petur Johannesen | ______ | 34 |
| Bjarti Thomsen | ______ | |
| Jacob Holm | ______ | |
| Janus Djurhuus | ______ | |
| Michael Jensen | ______ | |
| **C. Javnaðarflokkurin** | ______ | **1947** |
| Listin | ______ | 344 |
| Katrin D. Jakobsen | ______ | 459 |
| Kristian Magnussen | ______ | 328 |
| Elin Lindenskov | ______ | 191 |
| Joan Ziskason | ______ | 112 |
| Bergur Dam | ______ | 73 |
| Bjarki Mohr | ______ | |
| Helena Dam á Neystabø | ______ | |
| Jan Poulsen | ______ | |
| John Johannessen | ______ | |
| Kári Mortensen | ______ | |
| Sophus Dal-Christiansen | ______ | |
| **D. Sjálvstýrisflokkurin** | ______ | **335** |
| Listin | ______ | 93 |
| Ása Olsen | ______ | 63 |
| Hans J. Hermansen | ______ | 41 |
| Eilif Brimheim | ______ | 16 |
| Johan M. Stenberg | ______ | 16 |
| John Eysturoy | ______ | 11 |
| Carl August Arge | ______ | |
| Inga Foldbo Hjallnafoss | ______ | |
| Klæmint Olsen | ______ | |
| Malan Johansen | ______ | |
| Sámal Petur í Grund | ______ | |
| Terji Rasmussen | ______ | |
| **E. Tjóðveldisflokkurin** | ______ | **3166** |
| Listin | ______ | 215 |
| Høgni Hoydal | ______ | 1351 |
| Annita á Fríðriksmørk | ______ | 405 |
| Kristina Háfoss | ______ | 364 |
| Jógvan Arge | ______ | 205 |
| Finnur Helmsdal | ______ | 203 |
| Rói Egholm | ______ | 116 |
| Per Frits Simonsen | ______ | 53 |
| Bjørn Patursson | ______ | 51 |
| Niels Uni Dam | ______ | |
| Rúni Nielsen | ______ | |
| Tórfríð Jóhannesen | ______ | |
| **H. Miðflokkurin** | ______ | **601** |
| Listin | ______ | 66 |
| Jenis av Rana | ______ | 298 |
| Charlotta á Váli Olsen | ______ | 47 |
| Jónfinn Olsen | ______ | 47 |
| Elin N. W. Tausen | ______ | 46 |
| Jónfinn Petersen | ______ | 27 |
| Absalon Absalonsen | ______ | 23 |
| Álvur Kirke | ______ | 12 |
| Egin Henriksen | ______ | |

## Sandoyar valdømi

| Sandoyar valdømi | 2004 | 2002 |
|---|---|---|
| **A. Fólkaflokkurin** | ______ | **213** |
| Listin | ______ | 19 |
| Julian Thomsen | ______ | 67 |
| Óli Nolsøe | ______ | 18 |
| Eyðvardur Petersen | ______ | |
| Poul D. Klementsen | ______ | |
| **B. Sambandsflokkurin** | ______ | **137** |
| Listin | ______ | 34 |
| Eyðna Vidtfeldt | ______ | 61 |
| Edmund Svein Nielsen | ______ | 19 |
| Joen Peter Petersen | ______ | 13 |
| Terji Dalsgaard | ______ | |
| **C. Javnaðarflokkurin** | ______ | **333** |
| Listin | ______ | 31 |
| Gerhard Lognberg | ______ | 182 |
| Jákup Birgir Mohr | ______ | 70 |
| Eyðstein Dalsgaard | ______ | 38 |
| Tummas Frank Joensen | ______ | 12 |
| **D. Sjálvstýrisflokkurin** | ______ | **6** |
| Listin | ______ | 3 |
| Símun M.J. Nicolajsen | ______ | 3 |
| Eyðun Poulsen | ______ | |
| Sæbjørn Magnusson Olsen | ______ | |
| Torbjørn Poulsen | ______ | |
| **E. Tjóðveldisflokkurin** | ______ | **293** |
| Listin | ______ | 10 |
| Páll á Reynatúgvu | ______ | 160 |
| Dánjal Jákup Jakobsen | ______ | |
| Maiken Krabenhøft | ______ | |
| Símun av Skarði | ______ | |
| **H. Miðflokkurin** | ______ | **21** |
| Listin | ______ | 6 |
| Petur E. Poulsen | ______ | 5 |
| Vagn í Geil | ______ | 3 |
| Dania Lamhauge | ______ | |

## Suðuroyar valdømi

| Suðuroyar valdømi | 2004 | 2002 |
|---|---|---|
| **A. Fólkaflokkurin** | ______ | **424** |
| Listin | ______ | 45 |
| Heri Hjelm | ______ | 131 |
| Jacob Vestergaard | ______ | 85 |
| Bergur Bærendsen | ______ | 40 |
| Uni Jacobsen | ______ | 33 |
| Niels Pauli Hammer | ______ | 29 |
| Anna Djurhuus | ______ | |
| Sølvi Andreasen | ______ | |
| **B. Sambandsflokkurin** | ______ | **888** |
| Listin | ______ | 181 |
| Johan Dahl | ______ | 300 |
| Finnleif Guttesen | ______ | 113 |
| Svenning Borg | ______ | 83 |
| Jaspur Vang | ______ | 82 |
| Marjun Olsen | ______ | 75 |
| Zakarias Bech | ______ | 28 |
| Otto West | ______ | 26 |
| **C. Javnaðarflokkurin** | ______ | **1408** |
| Listin | ______ | 101 |
| Jóannes Eidisgaard | ______ | 503 |
| Hendrik Old | ______ | 243 |
| Sverre I. Midjord | ______ | 240 |
| Mikkjal Sørensen | ______ | 209 |
| Rúni Lisberg | ______ | 47 |
| Jastrid Nielsen | ______ | 34 |
| Nita Næs | ______ | |
| **E. Sjálvstýrisflokkurin** | ______ | |
| Listin | ______ | |
| Milson Berg | ______ | |
| Rúni Jacobsen | ______ | |
| Sonni Djurhuus | ______ | |
| **E. Tjóðveldisflokkurin** | ______ | **631** |
| Listin | ______ | 67 |
| Hergeir Nielsen | ______ | 228 |
| Ólavur Rasmussen | ______ | 69 |
| Annlis Bjarkhamar | ______ | |
| Dan Nielsen | ______ | |
| Johanna í Ólavsstovu | ______ | |
| Poul Erik Jacobsen | ______ | |
| **H. Miðflokkurin** | ______ | **69** |
| Listin | ______ | 20 |
| Petur Karl av Rana | ______ | 35 |
| Anna S. Dam | ______ | 14 |
| John Nielsen | ______ | |
| Kjarstein Stórh. Danielsen | ______ | |
| Sigmund Andreassen | ______ | |

